# Málsviðgerar til ALS

Arbeiðsloysisskipanin lýsir við hesum eftir 2 málsviðgerum til Tryggingar- & ávísingardeildina.
Talan er um eitt fast starv og eitt barsilsfarloyvisstarv.

**Størvini:**
Uppgávurnar hjá málsviðgerunum eru í høvuðsheitum:

- at taka sær av málsviðgerð/samrøðum í sambandi við arbeiðsloysistrygging og/ella arbeiðsávísing
- samskifti annars við viðskiftafólk okkara
- at vera við til at tillaga og menna tænasturnar hjá ALS

Starvsøkið er Tryggingar- & ávísingardeildin, har 10 fólk starvast.

Tryggingar- & ávísingardeildin umsitur m.a. útgjald av arbeiðsloysisstuðli, arbeiðsávísing fyri føroyska arbeiðsmarknaðin, førleikagevandi tiltøk, flyting millum A-kassar og arbeiðsloysistrygging fyri sjálvstøðug vinnurekandi

**Førleiki:**
Talan er um avbjóðandi størv, har tú mást:

- hava hóskandi útbúgving
- kunna arbeiða sjálvstøðugt
- kunna arbeiða við ymiskum uppgávum samstundis
- hava góð samstarvsevni
- duga væl at samskifta bæði í skrift og talu
- hava teldukunnleika á brúkarastøði

Fyrimunur er, um tú hevur arbeiðsroyndir innan fyrisiting og innlit í føroyska arbeiðsmarknaðin.

**Vit bjóða:**
Eitt starv við nógvum ymiskum uppgávum, har tú bæði arbeiðir sjálvstøðugt og í tøttum samstarvi við onnur.

Góðir møguleikar eru fyri skeiðluttøku og eftirútbúgving.

Løn sambært avtalu. Miðað verður eftir, at størvini verða sett sum skjótast.

**Umsókn:**
Umsóknir, við avriti av prógvum og møguligum viðmælum, skulu vera ALS í hendi í seinasta lagi týsdagin 25. februar 2003 kl. 12.00.

Umsóknir skulu sendast til:

ALS, Postsmoga 3022,
110 Tórshavn

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til deildarleiðaran, Petur Elias Nielsen, á tel. 349550 ella á teldupostadressu petur@als.fo.

SANSIR 355 355

*ALS hevur til endamáls at veita fíggjarligan stuðul til arbeiðsleys, at virka fyri bøttum møguleikum hjá arbeiðsleysum at fáa arbeiði og at umsita arbeiðsávísing fyri føroyska arbeiðsmarknaðin. Á ALS starvast í løtuni 18 fólk. Virksemið hjá ALS er í høvuðsheitum lógarásett. Ovastu leiðsluna hevur stýrið fyri ALS, sum – eftir tilmæli frá arbeiðsgevara- og løntakarafeløgunum á arbeiðsmarknaðinum – verður valt av Føroya Landsstýri.*

ALS
Arbeiðsloysisskipanin • Postsmoga 3022
FO-110 Tórshavn • Tel 349550 • Fax 349551
als@als.fo • www.als.fo



**Hagstova Føroya**

*er sjálvstøðugi hagtalsstovnur landsins.*

*Stovnurin er í trimum deildum - Hagdeild, KT-deild og Útgávudeild, sum samstarva um at veita almenninginum góð og skjót hagtøl um so nógv viðurskifti sum til ber.*

*Á stovninum arbeiða 14 fólk - búskaparfrøðingar, samfelagsfrøðingar, KT tøkningar og skrivstovufólk.*

## *Starv á Hagstovuni*

*Hagstovan hevur tørv á fólki til at fáa nýggjar hagtalsuppgerðir til vega um arbeiðsmarknaðar-, lønar- og inntøkuviðurskifti.*

*Til at hava hesa uppgávu um hendi, sóknast vit eftir einum væl útbúnum fólki, sum hevur áhuga í hagtølum og evni at fást við tøl. Verkætlaninar í hesum sambandi fara fram í tøttum samstarvi við KT tøkningar og tí vera eisini krøv sett um góð samstarvsevni og góð samskiftisevni um teldutøkni.*

*Besti førleikin er akademisk útbúgving, búskaparfrøðilig ella samfelagsfrøðilig, men hevur tú aðra hægri útbúgving og haraftrat royndir ella áhuga í samfelagsmálum, kann hetta vera nøktandi førleiki til starvið. Royndir av arbeiði við telduforritum og datagrunnum geva fyrimun.*

*Starvið verður lønt eftir galdandi sáttmála millum Landsstýrið og avvarðandi fakfelag.*

*Umsóknirnar skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 1.mars 2003.*

*Set teg í samband við Axel Nolsøe, deildarleiðara, ella Hermann Oskarsson, stjóra, á Hagstovu Føroya, telefon 352800, vilt tú hava meira at vita um starvið.*

Sosialurin
Lesið Sosialin
-tað loysir seg!



## Lærlingur søkist

**Søkt verður eftir bakaralærlingi til at byrja sum skjótast.**

**Umsóknir skulu sendast til Miðberg Bakarí, Heiðavegur, 600 Saltangará. Umsóknarfreist 15. mars 2003.**

**Ynskir tú at fáa nærri at vita um starvið, kanst tú venda tær til Sofus Hansen, tlf. 447366.**

MIÐBERG

## Lastbila- og bilsmiðjur

**Søkt verður eftir avíkavist lastbilasmiðji og bilsmiðji at byrja beinanvegin á bilverkstaðl okkara.**

Viðkomandi útbúgving er ein fyrimunur,
- tó eingin treyt.
Skrivlig umsókn við prógvum, viðmæli v.m skal sendast til:

**Ivan Johansen Bilar**
**Hoyvíksvegur 63**
**100-Tórshavn**
**Att: Leif Johansen, verkstaðsstjóri**

*Virkislýsing:*
*Ivan Johansen Bilar er ein bilasøla í menning, umboðandi Citroen, Mitsubishi, Mercedes-Benz, Daimler Chrysler, umframt at vera umboð fyri Dinitrol rustviðgerð í Føroyum. Fyritøkan er bygd upp við søludeild, goymslu og mekaniskum verkstaði. Í dag starvast 22 fólk hjá Ivan Johansen Bilum.*

CITROËN DaimlerChrysler MITSUBISHI MOTORS
Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo



Fá tann rætta køkin til tað rætta endamálið frá

tvis

pf Klement Petersen
Høgaból • 600 Saltangará • tel. 447560 • fax 448460



**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

# Endurlýsing

Vegna mistak í hesi lýsing, verður lýst av nýggjum soleiðis:

## Sjúkrarøktarfrøðingar

Hesi avloysarastørv sum sjúkrarøktarfrøðingur á **B7** eru leys at søkja:

- á starvsbrøki 0,6 í skiftandi vaktum ***skjótast gjørligt*** til og við 29. februar 2004
- fulltíðarstarv í skiftandi vaktum frá ***skjótast gjørligt***, til og við 31. juli 2003
- á starvsbrøki 0,8 í skiftandi vaktum frá 1. mai 2003 ella eftir avtalu, til og við 31. oktober 2003

Deildin hevur 15 seingjapláss og tekur sær av sjúklingum við m.a. onkologiskum-, nýra-, lungagikta- og ryggjasjúkum v.m.

**Førleikakrøv:**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- fakligan áhuga innan medicinska røkt og viðgerð
- góð samstarvsevni

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til Evu Mortensen, deildarleiðara á **B7**, telefon 31 35 40, lokal 107 ella til Ásu Poulsen, leiðandi sjúkrarøktarfrøðingur, lokal 300, e-post asap@ahs.fo.

**Setanartreytir:**
Løn og setanartreytir smb. sáttmálan millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og viðmælum e.l. skal sendast til

**Landssjúkrahúsið**
Starvsfólkadeildin
100 Tórshavn

Umsóknarfreistin er ***10. mars 2003 kl. 12.00.***

## Arkivreolir til sølu

Kompaktreolskipan av merkinum NORD-PLAN er til sølu um hóskandi boð fæst. Talan er um uml. 950 hillametur.

Vognurin er 80X300 cm og hillin er 40X100 cm.

Áhugaði kunnu venda sær til
Føroya Banka í Tórshavn, tel 31 13 50.
Spyr eftir Herluf ella Hilbert.
Teldupostur: fyrisitingardeildin@foroyabanki.fo

FØROYA BANKI



# Stuðul frá FITUR



FITUR er grunnur, sum veitir stuðul innan samstarvi millum Føroyar og Ísland, ferðavinnuni at frama.
Stuðul verður veittur innan hesi øki:
Ferðavinnuútbúgving
Samskipan av ferðum - "kombinationsturisme"
Fólksligt millumlandasamstarv, sum gevur vitan innan mentan, livihátt, vinnur v.m.
Samstarv millum flutningsfeløg
Marknaðarføring innan ferðavinnu

Til dømis verður stuðul veittur til:
- Ítróttafeløg
- Skúlar og útbúgvingarstøð (kunningarferðir)
- Vinnufeløg
- Mentunarfeløg
- Kommunal samstarvsfeløg
- Vinarbýir
- Hátíðarhald



Umsóknir skulu stílast á donskum ella enskum og sendast til:

**FITUR**
**c/o Ferðaráð Føroya**
**Postsmoga 118**
**FO-110 Tórshavn**

ella

**FITUR**
**c/o Ferðamálsráð Íslands**
**Lækjargata 3**
**IS-101 Reykjavík, Ísland**

*Seinasta freist at søkja er 14. mars 2003.*

*Í nevndini sita Steinn Lárusson, formaður, Arnbjørg Sveinsdóttir, Gunnar Sigurdsson, Marita Danielsen, Heri Niclasen og Hans Joensen*

ÍSLAND • FØROYAR

## Mist koyrikortið?

**Vikuskiftisskeið til tín ið hevur mist koyrikortið verður fríggjadagin 21. feb og leygardagin 22. feb**



**Eysturoyar Teoriskúli**
**Hugo Kristiansen, tel. 225 225**

Sosialurin - 311820

## Nýggjar TANNPROTESUR

**Broytingar og umvælingar av gomlum protesum**

Kliniskur tannteknikari
Bergur á Reynatrøð

Opið er:
mánadag-hósdag frá kl. 9-16
fríggjadag frá kl. 9-12

Børkuvegur
620 Runavík
Tlf. 448480